## Ummælini eru ymisk

Danska heimasíðan Gaffa.dk, sum fylgir væl við í tónleiki, gevur fyrstu útgávuni hjá Lizzie heldur ivasamt ummæli. Ummælarin heldur, at Lizzie rakar við síðuna av sínari útgávu, og hon fær bert tvær av møguligum seks stjørnum. Hinvegin er ummælarin Hennin Høeg á BT meira jaligur mótvegis útgávuni Ramt I Natten. Hann heldur, at framleiðslan er í topp, og honum dámar sera væl røddina hjá Lizzie. Høeg heldur, at júst stóra hittið Ramt I Natten er besti sangurin hjá Lizzie, men aðrir sangir á útgávuni fanga eisini, sigur hann. BT gevur Lizzie fýra av seks stjørnum.



# Rýmdi av landinum o

**- Føroyar eru ikki so stórar, og eg hevði sera stórar planir. So eg hugsaði, at eg mátti bara leypa út í tað og flyta til Danmarkar, sigur songkvinnan Lizzie, sum 15 ára gomul flutti av landinum. 11 ár seinni er hon blivin poppstjørna í Danmark og eigur mest spælda sangin í donskum tónleiki í løtuni**



## Samrøða



**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

25 ára gamla Ann Elisabeth Berg – Lizzie - hevur rættiliga vunnið seg upp á tónleikatindin í Danmark.

Hon eigur populerasta sangin í donskum popptónleiki í løtuni, og seinastu vikurnar hevur hon ligið ovast á fleiri donskum hitlistum við sanginum Ramt I Natten.

Stakfløgan hevur fingið platinvirðisløn, tí hon hevur selt fleiri enn 15.000 eintøk, og sangurin nærkast nú eini platin-virðisløn afturat. Ramt I Natten hevur eisini ligið ovast á Tjeklistanum hjá Danmarks Radio, og á iTunes er sangurin tann mest downloadaði danski sangurin í løtuni.

Tað hevur gingið við rúkandi ferð hjá Lizzie, tí hetta er fyrsti sangurin, sum hon hevur givið út í Danmark, og gjøgnumbrotið hjá henni komið nógv fyrri, enn hon sjálv hevði roknað við.

- Tað hevur gingið sera skjótt hjá mær. Eg hevði roknað við, at eg skuldi brúka nógv longri tíð til kom fram sum sangari. Eg havi arbeitt við tónleiki í nógv ár, og alt hevur tikið langa tíð, men nú tá fyrsta stakfløgan hjá mær kom út, fór hon upp á tindin beinanvegin. Tað er stuttligt, men eg skal líka venja meg til hetta, sigur Lizzie.

### Gingið betur enn væntað

Lizzie hevði ikki roknað við, at sangurin Ramt I Natten skuldi fara at klára seg so væl, sum hann hevur gjørt.

- Eg dugi illa at siga, hví hesin sangurin er blivin so populerur. Eg havi sjálv skrivað og gjørt sangin, og eg havi hoyrt han óteljandi ferðir í studio. Men kanska appelerar hann til eina breiða fjøld. Sangurin er lættur at syngja við til, og beatið er lætt at dansa til, sigur hon.

- Tá eg skrivi tónleik, so byrji eg við beatinum. Eg hoyrdi hetta 80'ara beatið, og mær dámdi tað sera væl . Tað byrjaði við rútmunum, og so komu lagið og teksturin.

Tað verður sagt um tónleikin hjá Lizzie, at hann hevur fingið íblástur frá poppinum í 80'unum.

- Um tú lurtar eftir fløguni hjá mær, so er tað ikki bara 80'ara poppur. Eg havi blandað ymisk sløg av tónleiki, og eg havi eisini brúkt nakað av tí góða frá 80'unum.

### Tónleikur í blóðinum

Hóast hon ikki hevur verið millum kendastu tónleikararnar í Føroyum – fyrr enn nú - so Lizzie

Sosialurin